Ítróttar
Sosialurin
Nr. 108 • hósdagur • 8. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Havnin og Sandavágur vunnu FM í skúlatalvi

**Annan hvítusunnudag vóru finalurnar í FM í skúlatalvi avgreiddar í Samljóð í Skopun, og endin gjødist at Havnin vann tann eldra bólkin, meðan Sandavágur vann tann yngra**

SKÚLATALV
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

22 lið vóru við í FM-finaluni í skúlatelving, og tá ið opni bólkurin verður roknaður við, vóru fleiri enn hundrað ungir telvarar við í kappingini. Hetta var meira enn tey bæði innleiðandi umførini, har uindirtøkan eisini verða sera stór.

Kappast var í tveimum bólkum, og í tí eldra bólkinum gjørdist Havnin vinnari. Í hølunum á teimum komu Klaksvík og Sandavágur, og tað var líka við, at Havnin spældi sær av við leiðsluna og Klaksvík streyk fram um.

Sandavágur vann síðani ein rímiliga greiðan sigur um bronsuna á Róki, meðan finalan um gullið endaði 8-8 ímillum Klaksvíkina og Havnina. Finalan varð telvd soleiðis, at teir 4 telvararnir á liðunum allir telvdu ímóti hvørjum øðrum. Í seinasta umfarinum snávaðu 1. og 2. borð hjá Havnini og harvið stóð á jøvnum. Avgerandi var síðani, at Hjalti Toftum Jógvansson á 1. borði hjá Havnini hevði vunnið 3 talv í finaluni, meðan 1. borð hjá Klaksvík, DM Herborg Hansen hevði vunnið 2 talv. Harvið vann Havnin FM við minst møguligari margin. FM liðið úr Havnini var mannað við: Hjalta Toftum Jógvansson, Margar Berg, Heiðriki T. Jacobsen og Eli Nolsøe Leifsson.

### 4. flokkur og yngri

Spenningurin var stórur í FM finaluni fyri tey yngru. Undankappingarnar góvu onga greiða ábending um ein favoritt í finaluni. Fyrru undankappingina vann Sandavágur og tað seinnu vann Klaksvík í harðari kapping við Havnina, og Rókur lá støðugt framvið.

Sandavágur dró longsta stráið við einum rímiliga greiðum sigri, meðan Rókur gjørdist greiður silvurvinnari. Stríðið um bronsuna gjørdist sera tætt. Havnin og Klaksvík fingu eins nógv dystarstig, men Havnin lá omaná, tá liðið hevði vunnið eittans talvið meiri enn Klaksvík. Klaksvíkingar eru ivaleyst vónbrotnir soleiðis at detta uttanfyri plaseringarnar, eftir frálíkar undankappingar, men teir raktu ikki dagin og fingu, tá samanumkom, ov lítið burturúr fremru borðunum. FM liðið úr Sandavági var mannað við: Høgna Egilstoft Nielsen, Janus Egilstoft Nielsen, Sølva Egilsson, Jóanis Albert Nielsen og Hørdi Johansen.

### Opnu bólkarnar

Kappast var eisini í tveimum opnum bólkum á finaludegnum. Í eldra bólkinum gjørdist Vestmanna vinnari frammanfyri Kollafjørð, sum annars var roknaður sum favorittur.

Vinnandi liðið úr Vestmanna var mannað við: Rúna Vørmadal, Borgar Jónsson Stórá, Reidar Egilsnes og Jógvan Emil Joensen.

Heili sjey lið av Sandoynni og eitt lið úr Vestmanna dystaðust í opna bólkinum fyri tey yngstu. Spenningurin var sera stórur heilt til síðsta leik. Lokaluppgerðin í millum Sand og Skálavík – gullstríðið – varð ikki avgjørt fyrr enn í seinasta talvinum. Og tá stóð á jøvnum. Sandur og Skálavík høvdu 17 stig hvør. Nærri eftirteljingar staðfestu, at Sandur hevði eittans vunnið talvið meiri enn Skálavík. Manningin hjá Gullvinnarunum heiman av Sandi vóru: Dan í Soylu, Dávid Henriksen, Steintór Fagradal og Marta Hentze.

### Kappast aftur í heyst

Skúlatalvkappingarnar eru av á hesum sinni. Lagt verður aftur til brots í heyst. Tá eru FM kappingarnar fyri einstaklingar á skránni.

10 teir frægastu skúlatelvararnir í ymiskum aldursbólkum vinna sær tá rætt at umboða Føroyar í telving um Norðurlandameistaraheitið í skúlatelving, sum í februar mánað 2007 verður í Íslandi. Seinasta fingu vit sum kunnugt norðurlendskan meistara, Helga Dam Ziska, tá kappingin varð telvað í Finlandi.



*Havnin vann eldra bólkin. FM liðið úr Havnini var mannað við: Hjalta Toftum Jógvansson, Margar Berg, Heiðriki T. Jacobsen og Eli Nolsøe Leifsson*




*Sandavágur vann bólkin hjá teimum yngru. FM liðið úr Sandavági var mannað við: Høgna Egilstoft Nielsen, Janus Egilstoft Nielsen, Sølva Egilsson, Jóanis Albert Nielsen og Hørdi Johansen*



*Eli Nolsøe Leifsson hugsar seg væl um, áðrenn hann flytir fólkið í finaluni ímóti Klaksvík*

---

**STUTT SAGT**

### Dómsnevndin viðgerð HB-málið

Dómsnevndin hjá Fótbóltssambandinum er farið undir viðgerðina av málinum um spæliloyvið hjá Páll Mohr Joensen. HB hevur kært avgerðina hjá Kappingarnevndini hjá FSF um, at HB skal tapa steypadystin ímóti VB/Sumba, tí spæliloyvið hjá HB-áleyparanum var ikki komið upp á pláss áðrenn dystin. Hetta er aðru ferð, at Dómsnevndin hjá FSF skal taka støðu í málinum

– Vit hava nú eina leypandi viðgerð av málinum, og eg dugi einki at siga um, nær vit koma til eina niðurstøðu, sigur Høgni Høgnesen, formaður í Dómsnevndini.

Fellur avgerðini í hesari vikuni?

– Eg dugi ikki at siga tað í løtuni. Málið skal hava sína viðgerð, áðrenn vit taka niðurstøðuna.

**ek**

### Kringvarpið kann missa alt

Um Kringvarp Føroya leggur sáttmálastríðið við Ítróttarsamband Føroya fyri ein gerðarætt, merkir tað samstundis, at sáttmálin ikki er galdandi, og at einki má sendast frá føroyskum ítrótti. Tað vil siga, at Útvarpið missir síni rættindi at siga frá øllum føroyskum ítrótti – eisini Formuladeildina og til dømis kappróðurin – og tað sama er galdandi fyri Sjónvarpið. Skal dekningurin av Formuladeildini og øðrum ítrótti halda fram í Útvarpinum, meðan málið er í gerðarættinum, skulu Kringvarpið og ÍSF gera eina serstaka avtalu um hetta. Gerðarætturin kann arbeiða upp í átta vikur við málinum.

### Miðlafelagið kann senda ítrótt

ÍSF og Miðlafelagið skrivaðu í gjár undir avtalu, sum gevur Miðlafelagnum rætt at senda upptøkur frá lands-, steypa- og FM-kappingum og ítróttartiltøkum. Miðlafelagið er felagið, ið eigur tveir triðingar av Sosialinum. Í fyrsta umfari kemur avtalan at fevna um heimasíðurnar www.portal.fo og www.sportal.fo, har Sosialurin og Føroya Tele hava samstarv um tíðindaflutningin. Soleiðis verður frameftir møguleiki at síggja video-klipp frá ítróttarhendingum og ítróttartíðindi annars á hesum heimasíðum.